Ongantíð nakar ivi

Spenningur var ongantíð um úrslitið, tá Kyndil og Tjaldur leygardagin dystaðust í bestu kvinnudeildini

JÁKUP MØRK

Kyndil-Tjaldur
28-21 (15-10)

Tjaldur hevur enn ikki fingið nakað stig til høldar hetta kappingarárið, og tað mundu eisini vera tey fægstu, sum ivaðust í, hvønn veg stigini skuldu fara, tá nýkosnu steypavinnararnir úr Kyndli tóku ímóti sunnudagin.

Eingin spenningur

Kyndilsgenturnar lótu heldur ongantíð nakran iva vera um, at tær so sanniliga ætlaðu sær stigini sunnudagin.

Eftir at Tjaldur hevði lagt seg fram um fram um fyrstu løtuna, setti kyndilsliðið ferðina nakað upp, og eftir hetta var als eingin ivi um, at sitigini skuldu verða verandi í Havnini.

Eftir stuttari løtu hevði heimaliðið vunnið sær eina trygga leiðslu, og munurin ikki vaks so øgiliga nógv eftir hetta, so høvdu tær grønu tamarhald á støðuni gjøgnum allan dystin.

Ein kundi kanska vænta, at runavíkingar fóru at gerast offur fyri enn einari eyðmýking, men so galið gjørdist tað kortini ikki, í hvussu so er ikki á pappírinum. At kyndilsliðið í stórum pørtum av dystinum tók sær av løttum er so ein onnur søga, sum ikki sæst, tá stigatalvan verður gjørd upp við kappingarárslok, men sum Tjaldur spælur í løtuni er lítið at ivast í, at eitt runt 0 framvegis fer at standa á stigatalvuni.

Tó er kanska ein lítil glotti at hóma hjá tjaldurskvinnunum, tí sunnudagin var Beinta Joensen aftur at síggja á liðnum. Hon hevur annars verið í barnsburðarfarloyvi alt kappingarárið, men við henni á liðnum, eru møguleikarnir hjá Tjaldrinum so øktir nakað.

Lítið er tó at ivast í, at skal Tjaldur taka nakað stig í kappingarárinum, verður tað orsakað av at mótstøðuliðini undirmeta tær, og kanska verður hetta veruleiki onkran dystin.

Stríðast fyri silvurinum

Kyndilsliðið er framhaldandi partur í silvurstríðnum, har tær í løtuni eru tvey stig aftan fyri VÍF, men við einum dysti til góðar. Spurningurin er so, um kyndilsliðið megnar at basa Stjørnuni, tá tær komandi týsdag skulu til Klaksvíkar at royna seg.

Megna tær tá at endurtaka bragdið frá hálvfinalunum í steypakappingini standa tær í eini sera góðari støðu. Hinvegin kann ein ósigur gera, at VÍF fer at hava allar trumfirnar á hondini, tá avgerðin um annað plássið skal takast. Fyrsta plássið endar uttan í Klaksvík, hóast tað á pappírinum enn kann broytast, tó at hetta tykist vera nakað veruleikafjart.

Fyrst gongur leiðin tó til Vágs, har VB skal royna at hevna ósigurin í finaludystinum, og kravið til kyndilsliðið er púra einfalt í hesum dysti. Skulu tær framvegis hava ein leiklut í silvurstríðnum, er neyðugt at vinna tann dystin.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 9 (1), Rakul Joensen 6, Jórun Ludvig 4, Ann Hansen 3, Palma Petersen 3, Anya Midjord 2, Jensia Petersen 1
Tjaldur: Kristine Ellingsgaard 6, Sunrid Gleðisheygg 5 (2), Beinta Joensen 3, Mona Langgaard 2, Hansa Mikkelsen 2, Heidi Jacobsen 2, Elinbjørg Hammer 1
Brotskøst:
Kyndil 3, Tjaldur 3
Útvísingar:
Kyndil 1, Tjaldur 2
Dómarar úr Neistanum:
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen

Málveitsla suðuri í Vági

Í einum ógvuliga málríkum dysti, eydnaðist tað Stjørnuni at fáa tvey stig norður aftur við sær, hóast tær í stórum pørtum av dystinum høvdu alstórar trupulleikar av VB

JÁKUP MØRK

VB-Stjørnan
30-33 (15-17)

Eftir vónbrotið í finaludystinum seinasta vikuskifti, skuldi VB sunnudagin royna at reisa seg, hóast tær so at siga einki hava at spæla fyri tað, sum eftir er, av kappingarárinum.

Gestirnir hesu ferð vóru oddafiskarnir úr Klaksvík, og útlit vóru tí fyri einum sera torførum dysti, har VB liðið helst ikki skuldi gera sær alt ov stórar vónir um at hava tey bæði stigini har suðuri.

Rannvá bjargaði Stjørnuni

Tað gjørdist tó rættuliga skjótt greitt, at klaksvíksgenturnar í øllum førum ikki skuldu vænta sær tvey løtt stig í høllini har suðuri.

VB genturnar byrjaðu dystin sera væl, og ikki var líkt til, at stjørnurnar úr Klaksvík fingu loyvi til at spæla sítt vanliga spæl.

Hesu ferð varð tað nevnliga VB, sum í nógv størri mun kundi gera sær dælt av kontraspælinum, sum annars hevur verið eitt hitt sterkasta vápnið hjá klaksvíksgentunum.

Útiliðið var kanska eisini nakað skert, tí bæði Anna K. Samson og Una Olsen vóru staddar uttanlanda til dystin. Í teirra stað leikti Ragna Andreasen, og ikki kann sigast annað enn, at hon fekk prógvað, at breiddin á liðnum er í lagi.

Sum sagt, so royndu tær á heimaliðinum at gera sítt til, at klaksvíksgenturnar skuldu fáa ein harðan dyst, og ikki kann sigast annað enn, at hetta eydnaðist sera væl.

Eftir dystin frættu vit, at størsta orsøkin til, at Stjørnan ikki varð fullkomuliga afturúrsigld fyrsta hálva tíman var, at Rannvá stóð ein rimmar dyst í málinum. Fleiri ferð hevði hon góðar bjarningar, tá á stóð, og tað gjørdi tað ofta.

Kontraspælið hjá VB koyrdi sera væl, og har umframt dugdu tær sera væl at gera sær dælt av, at verjan hjá Stjørnuni í fleiri førum var sera passiv.

Breiddin væntar

Tað er skrivað fleiri ferðir hetta kapingarárið, at VB liðið hevur eitt lið, sum er samansett av fleiri serae evnaríkum leikarum, og í nógvum dystum hava tær verið sera nær sigrinum, uttan at tað hevur eydnast teimum at vinna dystin.

Í so máta var hesin dysturin einki undantak, og spurningurin er helst, um breiddin á liðnum ikki er í minna lagi. Ikki tí, bonkurin hjá heimaliðnum var væl mannaður sunnudagin, men kortini hendi tað bæði í fyrra og í seinna hálvleiki, at liðið so at siga steðgar upp eina løtu.

Móti endanum av fyrra hálvleiki Stjørnan fimm mál á rað, og kundi tí fara til hálvleiks við eini tvey måla leiðslu, og miðskeiðis í seinna hálvleiki varð sama skilið, tá Stjørnan fekk fýra mál á rað, og harvið skapti grundarlagið undir endaliga sigrinum.

Vónandi fella VB genturnar tó ikki í fátt av hesum, tí tað er einki at ivast í, at tilfarið er sera gott hjá teimum, og halda leikararnir áfram við venjingini, kunnu tær helst gera nógv meira um seg komandi árini.

Í ár verður helst ikki talan um tær stóru skreytirnar, og í øllum førum tykjast heiðursmerkini at vera langt burturi. Tó kunnu tær helst arga nøkur av oddaliðunum, og fyrsta møguleikan til tess fáa tær sunnudagin, tá tær hava møguleika at hevna ósigurin í steypafinaluni.

Stjørnan tykist hinvegin stevna beint móti FM-heitinum, og sum venjari teira, Rógvi Nielsen, segði eftir dystin: »Tá vit kunnu vinna ein slíkan dyst, dugi eg illa at síggja, hvat skal steðga okkum«.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
VB: Regina Rádó 10 (2), Arnleyð Krosslá 8, Gurið Mortensen 6 (1), Sólrun Krosslá 3 (1), Christina Holm 2, Eyðbritt Krosslá 1
Stjørnan: Vesna Tomajek 11 (8), Annika Ljósstein 7, Simona Hansen 7, Andrijana Milodanovic 4, Ragna Andreasen 2, Joan M. Joensen 2
Brotskøst:
VB 6, Stjørnan 8
Útvísingar:
VB 2, Stjørnan 3
Dómarar úr StÍF:
Pole Hansen og Alexandur Johansen

Regina Rádó skeyt ikki færri enn 10 mál sunnudagin, men hetta var tó ikki nóg mikið til at basa Stjørnuni
Savnsmynd

KÍF fór av niðastu rók

Meginpartin av kappingarárinum hava kollfirðingar verið á niðasta sessinum, men við sigrinum á hoyvíkingum fór liðið tvey pláss upp á stigatalvuni

JÁKUP MØRK

KÍF-H71 26-22 (11-10)

Alt kappingarárið hava kollfirðingar og hoyvíkingar saman við runavíkingum stríðst um, hvør av teimum skal hava ivasama heiðurin av eiga niðasta plássið á stigatalvuni.

Tá grundspælið var liðugt, varð av nógvum hildið, at hetta fór at gerast ein dystur millum KÍF og H71, men eftir dystin sunnudagin er støðan nú tann, at runavíkingarnir eiga niðasta sessin, meðan hoyvíkingar eftir ósigurin sunnudagin mugu finna seg í at liggja undir kollfirðingunum.

H71 betri byrjan

Tað vóru annars hoyvíkingar, sum byrjaðu betri sunnudagin, og fyrstu løtuna vóru tað eisini teir, sum fingu flestu málini.

Kollfirðingarnir megnaðu tó at svara aftur, seinna partin av hálvleiknum gekk sera javnt á í málskjótingini.

Tá liðini bæði hittust seinast, var tað Petur Martin Johansen, sum tók sær av yvirskriftunum, við tað at hann ta ferðina skeyt ikki færri enn 12 málunum í kollfarasigrinum.

Hetta vildu hoyvíkingarnir ikki lata sær lynda aftur, og tískil var Petur Martin mansvardur stórar partar av dystinum sunnudagin. Av tí sama fekk hann ikki gjørt so nógv um seg, men hinvegin viðførdi hetta eisini, at meira pláss varð hjá liðfeløgum hansara. Hetta dugdi serliga Vagnur Johansen at gera sær dælt av.

Óla Kristian var á muni

Í seinna hálvleiki megnaðu kollfirðingar beinan vegin at leggja sjógv millum seg og hoyvíkingarnar, og sum útvarpsmaðurin kundi greiða frá, so helt hesin munur sær allan dystin á tamb.

Hóast kollfirðingar sostatt líktust einum vinnara meginpartin av seinna hálva tímanum, so góvust hoyvíkingar ongantíð á hondum. Munurin millum liðini var tó, at Óla Kristian í KÍF málinum hevði ein sera góðan dag. Fleiri ferðir mundi hann geva hoyvíkingum stórt høvuðbrýggj, tá hann stóð fyri skotum teirra, og millum annað tók hann ikki færri enn fimm av teimum níggju brotskøstunum, sum hoyvíkingar fingu tilluta í dystinum.

Í hinum endanum megnaðu hvørki Jens Skipagøta ella Høgni Johansen at togað spæl av sama flokki fram. Ikki tí, teir spældu ikki nakran vánaligan dyst, men teir megnaðu ikki á sama hátt sum Óla Kristian at seta dám á dystargongdina.

Móti endanum av dystinum royndu hoyvíkingar at fara langt fram á vøllin, fyri á tann hátt at órógva kollfirðingarnar, men tá var ov seint, og leikararnir á heimaliðnum kundu sostatt fegnast um en tvey stig til soltna stigaposan.

Dumpiplássið nærkast

Sum nevnt, so duttu hoyvíkingar eitt pláss niður á stigatalvuni sunnudagin, og vil illa til, kunnu teir fara niður at dumpiplássið komandi vikuskifti.

Tá skulu kollfirðingar nevnliga royna seg móti Tjaldur, og um runavíkingarnir vinna tann dystin, hava teir eins og kollfirðingar fimm stig.

Hoyvíkingar skulu tá royna seg móti vestmenningum, og tað er í øllum førum ikki væntandi, at H71 fer at fáa nakað sum helst burtur úr hesum dysti.

Í løtuni er tó ikki líkt til, at nakað av liðunum noyðist niður í aðru deild komandi ár. Einasta liðið, sum kann flyta upp úr aðru deild eru Stjørnan, men í løtuni eru teir á aftasta plássinum í deildini.

Petur Martin Poulsen, sum her sæst í dysti móti Neistanum, fór saman við liðfeløgunum tvey pláss upp á stigatalvuni hetta vikuskifti
Savnsmynd

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
KÍF: Petur M. Johansen 7 (3), Vagnur Johansen 7, Petur M. Poulsen 4, Jákup Dam 3, Rúni Nolsøe 3, Egill Steintórsson 1, Finn H. Johansen 1
H71: Halgir D. Olesen 7 (2), Allan Mørkøre 5 (2), Eyðun Højgaard 3, Olaf Vestergaard 2, Tróndur Vatnhamar 2, Hallur Danielsen 1, Rene D. Olesen 1, Svend Poulsen 1
Brotskøst:
KÍF 5, H71 9
Útvísingar:
KÍF 8, H71 1
Dómarar úr Tjaldur:
Dánial Hansen og Kári Hansen

Mjølnir hevur vunnið sær rættin at spæla móti Fleyr í finaludystinum í steypakappingini hjá monnum

Mjølnir í steypafinaluna

Flogbóltur: Seinnapartin sunnudagin varð semifinaludystur leiktur í steypakappingini hjá monnum. Fram og Mjølnir leiktu í Runavík. Mjølnir vann dystin 2-0 og teir eru tí til reiðar at hitta Fleyr í finaluni

SVEINUR TRÓNDARSON

Fram-Mjølnir 0-2
á uttanveltaðum vølli í Runavík

Fyri fyrstu ferð í fleiri harrans ár, skal tað aftur finnast ein almennur steypavinnari í flogbólti.

Henda kapping hevur ikki verið til síðani Fleyrkappingin varð til fyri skjótt nógvum árum síðani, og tað er ikki sørt, at tað — millum leikarar — hevur verið saknur í henni.

Tó so at tað nú kemur ein steypakapping, so er hon ikki skipað, sum í øðrum ítróttargreinum, tí almenna steypafinalan er ein finala millum liðini, sum hava klárað seg best í steypakappingini hjá Fleyr og hjá Mjølnir.

Hjá monnum var tað so, at Fleyr vann tær báðar kappingarnar. Men av tí at Fram var mótstøðuliðið í Havn og Mjølnir í Klaksvík, so máttu Fram og Mjølnir leika semifinaludyst sunnudagin, fyri at finna mótstøðuliðið hjá Fleyr.

Tað koyrir hjá Mjølnir

Av tí at hvørki av liðunum skuldi hava fyrimun í dystinum sunnudagin, varð hann leiktur á uttanveltaðum vølli. Høllin í Runavík, sum mangan er brúkt til landsliðsvenjingar, varð vald til leikstað, og tað var ikki illa hugsað, tí frástøðan er á leið líka long úr Havn og úr Klaksvík.

Semifinaluna vann Mjølnir greitt 2-0. Tí vera tað teir, sum skulu hitta Fleyr í steypafinaluni, sum verður leikt seinni í ár.

So tað sær út til, at tað koyrir væl hjá Mjølnir í løtuni. Fríggjakvøldið vunnu teir ruddiligan sigur á ÍF á Kambsdali, og sunnudagin endurtóku teir bragdi móti Fram.

Umframt at tað sjálvsagt er gott hjá Mjølnir at sleppa í steypafinaluna, so var dysturin sunnudagin eitt gott herðaklapp hjá Mjølnir í kappingini móti Fram, sum annars liggur tvey stig framman fyri teir í stigatalvuni. Tað verður annað av hesum liðunum, sum vinnur silvur, og tí hevur tað stóran sálarligan týdning fyri klaksvíkingarnar at vinna á havnarmonnunum.

Kærkomið høvið

Umframt tað, so er finalan, sum Mjølnir nú hevur tryggjað sær rætt til at spæla í, eitt kærkomið høvið hjá klaksvíkingum, at bøta um kappingarárið.

Tað er neyvan at taka ov rívan til, tá vit siga, at tað gekst teimum illa í hond fyrst í hesum kappingarárinum, men síðani jugoslaviski venjarin kom ti býin, hevur pípan fingið annað ljóð.

Dystirnir millum Fleyr og Mjølnir hava verið serstakliga spennandi, og tí eru útlit til, at vit fáa eina spennandi steypafinalu hjá monnum. Landskappingin er jú avgjørd ...